# Guðrun Sólja á **Jóansøkufestivalin**

**Ein av lokalu hetjunum og kendu sangfuglunum fer á pall á Jóansøkufestivalinum.**

**TÍÐINDASKRIV**

Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo

Guðrun Sólja Jacobsen fer nevniliga at syngja, og sum eina broyting fer hon at hava bólk við á pallin, og talan verður um annan stíl, enn vit vanliga hoyra hana syngja, nevniliga kvinnurock, so sum Skunk Anansie og Alanis Morisetta. Guðrun Sólja gjørdist landskend, tá hon á sinni vann donsku sangkappingina Stjerne For En Aften hjá Danmarks Radio. Unga gentan av Tvøroyri við stóru røddini var brádliga kend í øllum danska ríkinum, og heima í Føroyum ikki minst. So komu fløguútgávur, framførslur, eisini saman við kendum sangarum, men so við og við byrjaði ferðin oman aftur av tindunum, og heldur stilt gjørdist kring Guðruna Sólju. Men alla tíðina arbeiddi hon við sanginum, og sum nakað av tí seinasta hevur hon sungið nakrar sangir á donsku útgávuni av Disneyfilminum um Klokkeblomst. Á Jóansøkufestivalinum fer Guðrun Sólja á pall við bólki, og hon ætlar at hugna sær við rocktónleiki, so her verður spennandi at hoyra hana fyri fullum útblástri.















Staravegur 7 · FO-100 Tórshavn
Tel 31 55 88 · www.skemman.fo

Borð (90x150/240 cm) + 4 støðustólar. Okkara harðviðarrøð er bara framleidd av FSC-góðkendum harðviði, sum er høg góðska til lágprís. Borð við eykaplátum B90 x L150/240 x H74 cm
**Borð 1299,- Stólur 499,-**

**SKEMMAN**
**Heldur bíligari**